# Miðvikan

Kristian Djurhuus:

# Fyrst á posthúsið og síðan á dómaraskrivstovuna

**Nú er Kristian við at gerast vaksin, og hann fær sítt fyrsta arbeiði. Væl liggur fyri hjá honum og skjótt verður hann »headhuntaður« av sorinskrivaranun**

**11. partur**

Fyrst skal verða greitt eitt sindur meira frá húsinum hjá Klæmint Jacobsen úti á Reyni, sum varð umrøtt í seinasta parti. Húsini eru bygd uml. 1820 og skiftu eigara nakrar ferðir, áðrenn Klæmint keypti tey í 1864. Í fólkateljingini fyri 1870 búgva tá har Clement Jacobsen, »handelsbetjent« við konuni Susanne Cathrine Jacobsen. Bæði eru tá 36 ára gomul. Hjá teimum býr eisini vermóður Klæmint, Susanne Jacobsen, sum er 72 ár og einkja.

### Á posthúsinum

Eg kendi meg javnan sjúkan sum barn og havi hugsað nógv um, hvat orsøkin kundi vera. Ein orsøk kann vera, at eg sum smádrongur plagdi at mála vindeygu. Fyrst var tað heima, men tá grannarnir sóu, hvussu óførur eg var til tað, bóðu teir meg eisini mála. Tað kundi eg ikki siga nei til. Hetta kom eg at brúka allar mínar feriur til. Eg hugsi, at eg kanska ikki toldi alla hesa máling. Hetta var zinkhvítt , sum neyvan hevur verið gott fyri heilsuna.

### Slíkt arbeiði fekk ein sjálvsagt ikki løn fyri

Sum 15 ára gamal fekk eg pláss sum skrivstovumaður á posthúsinum. Postmeistarin C.C. Danielsen var giftur við mostir míni Onnu Sofíu. Danielsen hevði áhuga fyri, at eg lærdi so nógv sum gjørligt. Hann gav mær føroyska lógarsavnið, sum hann bað meg um at lesa uppá.



*Kristian Djurhuus lærdi at tekna í skúlanum hjá Jógvan Waagstein. Eftir hann liggur okkurt dømi um tað, sum kom burtur úr*

Danielsen hevði áðrenn hann gjørdist postmeistari verið fulltrúi hjá dómaranum og hevði eisini fleiri ferðir verið settur sorinskrivari. Tí hevði hann framvegis áhuga fyri løgfrøði.

*Christian Cornelius Danielsen var ein sermerktur maður. Hann var føddur í 1849. Hann kom at vera við í nógvum almennum virksemi í Havn. Umframt at vera postmeistari var hann eisini sparikassastjóri. Í seinasta parti varð nevnt um teir við Stein, sum áttu leiklut í bókini Glataðu Spælimenninir hjá William Heinesen. Men C.C. Danielsen átti eisini leiklut í hesi bók sum »sparekassebestyrer Ankersen«. Her verður hann lýstur sum sera viðgongdan á tí kristiliga/andaliga økinum. Men William mundi gera nakað nógv av. Annars var Danielsen virkin innan Meinigheitshúsið. Kona hansara var kend sum »heimadoktari« og hevur verið umrødd í røðini Hendur ið Sleptu.*

Á posthúsinum var eisini sonur Danielsen, Johan, sum var útbúgvin í postverkinum

Umframt var ein skrivstovukvinna, ein skrivstovumaður og eitt postboð, Tummas í Fjósi. Hetta var ikki nógv men kortini nóg mikið til tann dagliga postin. Men um jóltíðir máttu vit eisini arbeiða um náttina. Eg kann minnast eini jól, tá vit arbeiddu 50 tímar út í eitt. Men tá var eg eisini fullkomiliga fokkaður.

Tá í tíðini vórðu eisini tómar brennivínstunnur av bygd sendar við postinum. Tað vóru bygdir, har tað sást, at illa var drukkið. Tað komu eisini sekkir við ull og kloddar at senda til eitt spinnarí í Randers. Hesir sekkir vóru ofta fyltir við ótoy, serliga loppum. Tær bitu ongantíð meg, men tann gamli, postmeistarin, varð ofta bitin. Tá hetta hendi máttu vit ofta flenna, eisini sonurin Johan.

Tá hin gamli ikki var til staðar, og tað ikki var nakað serligt at gera, fór tíðin ofta við spølni. Tá blakaðu vit ullarsekkir ella vátar svampar eftir hvørjum øðrum. Ella eisini var



*C.C. Danielsen og konan Anna Sofia, sum var mostir Kristian Djurhuus*



*Posthúsið í miðbýnum*

ein vátur svampur lagdur á ein stól, sum onkur kundi seta seg á uttan at vita av tí.

Eina ferð hevði Johan, meðan hin gamli sat á síni skrivstovu, lagt ein slíkan svamp á mín stól. Eg varð sjálvandi vátur aftan. Eg varð so argur, at eg blakaði svampin eftir honum. Men hann bukkaði seg, so svampurin í staðin reyk inn á skrivstovuna hjá hinum gamla og rakti hann í skallan.

Nú væntaði eg at fáa sekkin beinanvegin, men tað hendi ikki. Hann sá tað stuttliga í støðuni og lat bara hurðina aftur. Eftir tann dag vóru vit meira varnir við svampum.

Tað var nú ikki bara spæl. Eg haldi meg kunna siga, at vit fingu nógv av skafti.

Bókhaldið var ført á gamlan hátt. Øll inn- og útgjøld vórðu førd á langar listar. So skuldi teljast saman í høvdinum. Tá kundi ofta vera eitt oyra á muni. Men tað varð leita eftir hesum oyranum, um tað tók dagar.

Postmeistarin Danielsen var eisini stjóri í Sparikassanum, og hann hevði ábyrgd av renturokningum og ársuppgerð. Her kundi eisini vera slíkir munir, sum tað kundi taka vikur at finna.

Sum eykaarbeiði slapp eg eisini at arbeiða í sparikassanum. Lønin var ikki tann stóra. Byrjunarlønin á posthúsinum var 15 kr, um mánaðin og í sparikassanum kundi eg vinna 10 kr. eyka. Hetta ljóðar ikki nógv. Fyri at sammeta við kostnaðarstøðið kann eg nevna, at ein klædningur